

*Alfred Olsen vann greiðan sigur á næstformansvalinum hjá Sambandsflokkinum fríggjakvøldið*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Landsfundur Sambandsfloksins:

## Alfred Olsen vann tryggan sigur

**Alfred Olsen er nýggjur næstformaður í Sambandsflokkinum, efir at hann fríggjakvøldið vann næstformansvalið móti Heðini Mortensen við 30 atkvøðum móti 18**

Næstformansval
*John Johannessen*

Ein greiður meililuti av limum Sambandsfloksins valdu fríggjakvøldið Alfred Olsen til næstformann í Sambandsflokkinum.

Tað vóru tvey valevni til næstformansvalið. Heðin Mortensen stillaði upp sum stuðul hjá Edmundi Joensen til formansvalið, og Alfred Olsen stillaði upp sum stuðul hjá Lisbeth L. Petersen.

Men næstformansvalið varð vunnið við einum heldur greiðari meiriluta enn formansvalið. Alfred Olsen fekk 30 atkvøðu, og Heðin Mortensen fekk 18 atkvøður.

Fakta:

## Valskipan Sambandsfloksins

Formansvalið í Sambandsflokkinum er soleiðis skipað, at tey sjey valfeløgini í ávikavist Norðoyggjum, Eysturoy, Norðurstreymoy, Suðurstreymoy, Vágoy, Sandoy og Suðuroy atkvøða við fimm atkvøðum í part. Sostatt er atkvøðutalið frá valfeløgunum tilsamans 35 atkvøður.

Síðani hevur Unga Sambandið fimm atkvøður, teir seks tinglimirnir hava eina í part, kassameistarin í flokkinum hevur eina, næstformaðurin hevur eina og at enda hava teir tríggir limirnir í starvsnevndini hjá Sambandsflokkinum eina atkvøðu í part.

Er flokkurin umboðaður á Fólkatingi, hevur fólkatingslimurin eisini eina atkvøðu, eins og landsstýrismenn hava eina atkvøðu í part, tá flokkurin er í samgongu.

Landsfundur Sambandsfloksins:

# Lisbeth vann formansvalið



*Læraraskúlahøllin fríggjakvøldið: Tað er júst almannakunngjørt, at Lisbeth L. Petersen hevur vunnið valið um formanssessin í Sambandsflokkinum við 26 atkvøðum móti 21*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Við fimm atkvøðum á muni eydnaðist Lisbeth L. Petersen fríggjakvøldið at koppa Edmund Joensen úr formanssessinum í Sambandsflokkinum**

Formansval
*John Johannessen*

– Eg takki fyri skeiðið og ynski Lisbeth góða eydnu í starvinum.

Soleiðis segði Edmund Joensen, tá hann beint eftir valúrslitið fríggjakvøldið takkaði fyri seg sum formaður Sambandsfloksins.

– Eg vil takka Edmundi fyri hansara tíð sum formaður og tykkum fyri at hava valt meg. Fólkið hevur talað á lógligan hátt og hevur valt meg til fomann. Hetta starvið fari eg at royna at røkja til fulnar – kanska eitt sindur ørðvísi enn Edmund, og tíðin vil fara at vísa, um tað er tað rætta.

Soleiðis segði Lisbeth L. Petersen, beint eftir, at hon hevði fingið at vita, at hon var vald til nýggjan formann í Sambandsflokkinum.

### Tættur dystur

Síðani tað var greitt, at Lisbeth L. Petersen fór at stilla upp ímóti Edmundi Joensen til formansvalið, hevur allatíðina verið roknað við, at talan fór at verða um eitt tætt val. 51 høvdu atkvøðurætt til formansvalið í ár. Og í farnu viku roknaði Sosialurin seg fram til, at tey bæði formansvalevnini høvdu tryggað sær 20 atkvøður í part og skuldu stíðast um tær ellivu, sum vóru eftir.

Øll, sum høvdu valrætt, vóru ikki møtt, tá formansvalið var á skránni á landsfundinum fríggjakvøldið. Tvey úr valfelagnum í Norðoyggjum og eitt úr felagnum í Suðuroynni vantaðu. Tí vóru bert 48 lógligar atkvøður á fundinum.

Hesar 48 atkvøðurnar vórðu soleiðis býttar, at Lisbeth L. Petersen fekk 26 og Edmund Joensen fekk 21. 1 atkvøða var blonk.

### Formaður í 10 ár

Edmund Joensen varð valdur til formann í Sambandsflokkinum í 1991, og hevur hann sitið í sessinum síðani tá.

Í hesum sessi hevur Edmund Joensen upplivað mangt. Hann gjørdist løgmaður í 1994 og sat í hesum sessi til 1998. Løgmansskeiðið byrjaði við svárari búskaparligari kreppu, men tá Edmund fór úr løgmanssessinum vóru aftur uppgangstíðir í Føroyum. Tað var eisini í løgmanstíðini hjá Edmund Joensen, at megiparturin av stóru bygnaðarbroytingunum í almennu umsitingini fóru fram.

Í 1998 var eisini kampval um formanssessin. Tá stillaði Jóhannes Martin Olsen upp ímóti Edmundi. Men tá eydnaðist tað Edmundi Joensen at vinna ein tepran sigur við 32 atkvøðum ímóti 26.

Landsfundur Sambandsfloksins:

# Tey ungu feldu Edmund

**Tað var Unga Sambandið, ið stillaði Lisbeth L. Petersen upp til formansvalið í Sambandsflokkinum. Og tað vóru eisini tær fimm atkvøðurnar hjá Unga Sambandinum, ið avgjørdu valið um formanssessin á landsfundinum fríggjakvøldið**

Formansval
*John Johannessen*

Eingin ivi er um, at tað var ungdómurin, ið avgjørdi formansvalið í Sambandsflokkinum fríggjakvøldið.

Tað er nærum hálvt ár síðani, at Unga Sambandið boðaði frá, at tey fóru at skjóta upp valevni til nýggjan formann á næsta landsfundi floksins. Og tey boðaðu eisini frá, at tey ætlaðu, at nýggi formaðurin skuldi vera Lisbeth L. Petersen.

Eftir drúgva umhugsunartíð játtaði Lisbeth at stilla upp til formansvalið, og tað vóru tær fimm atkvøðurnar hjá Unga Sambandinum, sum vóru orsøkin til, at hon fríggjakvøldið gjørdist nýggi formaður floksins.

Sambandsflokkurin hevur leingi gingið í tveimum fylgjum. Í øðrum fylginum hava verið tey, sum hava stuðla Edmundi Joensen í formanssessinum. Í hinum fylginum hava verið tey, sum ynskja broytingar í flokkinum við einum nýggjum formanni.

Hetta seinna fylgið hevur upp undir formansvalið stuðlað Lisbeth L. Petersen.

Í fylginum hjá Edmundi Joensen vóru limir í valfeløgunum úr Norðoyggjum, Vágum, Suðuroynni, Norðurstreymoynni og tinglimirnir Heðin Mortensen, Felmming Mikkelsen og sjálvsagt Edmund sjálvur.

Í fylginum hjá Lisbeth L. Petersen eru limirnir í Unga Sambandinum, sambandsfelagnum í Suðurstreymoynni, Sambandsfelagnum í Eysturoynni, onkur úr Sambandsfelagnum í Vágum, ein partur av starvsnevndini og tinglimurin Alfred Olsen og Lisbeth L. Petersen sjálv.

Tískil kundi ikki vera talan um annað enn eitt tætt val, sum tað eydnaðist Lisbeth at vinna við góðum stuðuli frá Unga Sambandinum. Hetta var eisini tað, sum Edmund Joensen ásannaði efir, at úrslitið var greitt.






*Eitt væl mannað flokstíng hjá Tjóðveldisflokkinum orðaði beint eftir fyrsta málið hjá føroyska fótbóltslandsliðnum móti Luksemburg leygardagin alemmu fráboðanina frá flokstinginum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Floksting Tjóðveldisfloksins:

# Tjóðveldisflokkurin byggir land

**Floksting Tjóðveldisfloksins samdist leygardagin um hesa fráboðan**

FLOKSTING
*John Johannessen*

Floksting Tjóðveldisfloksins ásannar, at føroyska tjóðin ongantíð hevur verið nærri tjóðarfrælsinum enn í dag. Flokstingið tekur fult undir við politisku semjuni um fullveldismálið, har samgonguflokkarnar hava bundið seg til fullveldisleistin. Ein sterkur Tjóðveldisflokkur er trygdin fyri, at fullveldisætlanin verður framd.

### Fólkið skal byggja

Føroyska fólkið vil frælsi og framburð. Tað er virkisfýsnið og íbirtandi lyndið í føroyska fólkinum ið skal byggja hetta landið og endurspeglast í politisku skipanini. Samfelagið blómar í løtini, við framgongd á øllum økjum. Hetta er ikki minst eitt úrslit av tí drívmegi, sum frælsishugsjónin umboðar.

### Framkomið samfelag

Tjóðveldisflokkurin fer framhaldandi at ganga á odda í tí neyðugu samfelagsligu endurnýggjanini, sum krevst um Føroyar skulu teljast millum heimsins framkomnu tjóðir. Føroyar skulu ganga á odda í heiminum fyri at skapa eitt samfelag, har samsvar er ímillum náttúru og menniskja. Eitt samfelag, har vit ganga á odda í umhvørvisvernd, burðardyggari framleiðslu og endurnýggjan og røkt av bæði menniskjaligum- og náttúrutilfeingi.

Føroyar skulu vera eitt samfelag fyri øll, har øll menniskjavirði framhaldandi eru umboðað. Harvið tryggja vit tað fjølbroytni, sum er sjálvur hornasteinurin undir einum rætvísum fólkaræðisligum føroyskum samfelag.

Floksting Tjóðveldisfloksins:

# Tingbólkurin skal skipast í framsøgufólk

**Flokstingið hjá Tjóðveldisflokkinum hevur samtykt eitt uppskot frá Unga Tjóðveldinum um at skipa tingbólkin í politisk framsøgufólk Nú skal hvør tinglimur sær hava ábyrgdina av ávísum málsøki**

Floksting
*John Johannessen*

Eitt greitt ábyrgdarbýti millum tingmenn setur uttan iva flokkin í sterkari støðu at møta avbjóðingum og at seta politisku dagsskránna.

Hetta heldur Unga Tjóðveldið, sum um vikuskiftið fekk uppskot sítt samtykt av flokstingi Tjóðveldisfloksins, um at skipa tingmanningina í politisk framsøgufólk.

Unga Tjóðveldið heldur, at tað ov ofta koma ymsar og ógreiðar útmeldingar frá ymsu tinglimunum í flokkinum um sama mál. Men eitt greitt ábyrgdarbýti millum tinglimirnar, fer at efir sannføring Unga Tjóðveldissins at beina fyri hesum.

– Við tað, at ein ávísur tingmaður hevur ábyrgdina av einum øki, og tað er hann, ið leggur fram vegna flokkin, verður betri samljóð í útmeldingum flokssins, sigur Unga Tjóðveldið í uppskoti sínum.

Harafturat heldur Unga Tjóðveldið, at ein slík skipan kann skapa eitt betri samskifti millum politikkarar, borgarar og fjølmiðlar. Tí við hesum ábyrgdarbýri vita tíðindafólk og onnur altíð, hvønn tey skulu venda sær til í sambandi við tey ymisku málini.




*Væl fyrireikaða uppskotið hjá Unga Tjóðveldinum um at skipa tingmaningina hjá Tjóðveldisflokkinum í politisk framsøgufólk, varð einmælt samtykt av flokstinginum*

*Mynd: John Johannessen*

– Eisini kann hetta skapa eitt munagott tingarbeiði, við tað, at tingmenn fáa høvi at leggja størri orku í sítt ávísa øki, heldur Unga Tjóðveldið.

Uppskotið hjá Unga Tjóðveldinum varð einmælt samtykt av flokstinginum.

Floksting Tjóðveldisfloksins:

## Halda eykating 26. mai

**Tjóðveldisflokkurin fer 26 mai at halda eykafloksting í sambandi við, at flokkurin ætlar at dagføra stevnumið floksins**

FLOKSTING
*John Johannessen*

Tjóðveldisflokkurin vil hava eina greiða støðu til politisku málini í dagsins samfelag.

Tí ætlar flokkurin at dagføra setvnumið síni, sum hann vanliga dagførir við jøvnum millum Tjóðveldisflokkurin hevur orðað eitt uppskot til dagførdu stevnumiðini, sum varð viðgjørt á flokstinginum um vikuskiftið. Men flokkurin heldur, at eitt tílíkt álvarsmál eigur at fáa álvarsama og gjølliga viðgerð. Tí samtykti flokstingið leygardagin, at eitt eyka floksting skal haldast 26. mai at viðgera og samtykkja nýggja stevnumiðini.

Limirnir í Tjóðveldisflokkinum halda, at tað ikki bert skal vera fullveldismálið, ið eyðkennir flokkin. Flokkurin skal eisini seta dagsskránna, tá tað um onnur samfelagsmál ræður. Millum annað hevur verið upp á tal, at tað skal standa í stevnumiðum Tjóðveldisfloksins, at landsjørðin ikki skal privatiserast.

26. mai er dagurin, tá ætlaða fólkaatkvøðan um sjálvstýrisleist skuldi haldast.

Floksting Tjóðveldisfloksins:

## Uppskot til stevnumið

- At ein greiðari politikkur skal førast, tá ræður um økismenning, arbeiðsmarknarðarmál og almenna bygnaðin.
- At Tjóðveldisflokkurin er ímóti privatisering av landsjørðini, men stuðlar frælsari vinnumøguleikum hjá festibøndum
- At flokkurin virkar fyri einum almennum fiskidaga- og veiðiloyvisbanka
- At flokkurin vil hava ein brúkaraumboðsmann settan á stovn
- At flokkurin orðar ein greiðan íbúðarpolitikk og stuðlar alternativari íbúðarbygging. Hartil eigur ein føroysk leigulóg at gerast, sum tryggjar bæði leigarum og útleigarum grundleggjandi rættindi. Eisini eigur skattingin av útleigu at verða endurskoðað við tí endamáli, at fleiri leiguíbúðir verða í boði til ein bíligari prís.
- At flokkurin virkar fyri at stovna eitt óheft Mentanarráð við breiðari umboðan fyri ymiskar samfelagsbólkar, ið eins og Búskaparráðið skal lýsa gondina innan mentanarlívið og koma við tilráðingum
- At Tjóðveldisflokkurin fer at leggja dent á at styrkja munandi um umhvørvispolitikkin.

